# Antin ert tú vinur ella ert tú fíggindi

**- Vit svaraðu bara einum fyrispurningi, sum varð sendur í telduposti av skrivstovuni hjá FA. Vit vórðu spurdir – og vit svaraðu, men hoyrdu ongantíð nakað aftur uttan hóttanir. Vit halda okkum tí ikki at hava gjørt nakað skeivt, og vit sýttu ongantíð fyri at fara í verkfall, sigur Óli Johannesen, formaður í Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag**

Vilmund Jacobsen

Tað stóðst ikki so lítið rok burtur úr, at Føroya Arbeiðarafelag í vikuni lýsti samhugaverkfall í Føroyum, tá arbeiðarafeløg í Íslandi, sum hava limir á íslendskum fiskamjølsvirkjum, ætlaðu sær í verkfall. Arbeiðarafeløg í Føroyum lýstu sín samhuga, og ætlanin við hesum var, at íslendsk lodnuskip ikki skuldu landast í Føroyum. Føroya Arbeiðarafelag hevur nógv limafeløg, og millum hesi eru bæði arbeiðsmanna-og arbeiðskvinnufelagið í Fuglafirði.

Men limafeløgini í Fuglafirði vóru ikki samd við sítt meginfelag um at lýsa samhuga og mæltu tí frá at gera tað. Kortini kom tað ongantíð har til, at feløgini sluppu at sýta fyri at fara í verkfall, tí eingin dialogur fekst millum lokalfelagið og meginfelagið.

Ætlaða verkfallið í Íslandi gjørdist eisini av ongum.

## Í andglettin

Formaðurin í Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag, Óli Johannesen, kom rættiliga í anglettin, tá forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, helt fyri, at stigið hjá fuglfirðingum var ein vanærilig skomm, sum hon málbar seg. Málið kom tó ongantíð so langt, at hóttanir um útblaking úr FA fuku um oyruni á nevndarlimunum í arbeiðarafeløgunum í Fuglafirði.

Óli Johnanesen hevur sína søgu at siga um, hvussu Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag upplivdi hesar dagarnar, og hann heldur avgjørt ikki, at Føroya Arbeiðarafelag takladi tingini rætt.

Hann sigur, at Ingeborg Vinther setti seg í samband við felagið í Fuglafirði hósdagin hin 10. februar og læt tey vita, at FA hevði sent felagnum í Fuglafirði teldupost og bað felagið svara postinum skjótast gjørligt.

- Eg segði, at vit skuldu geva FA eitt svar kvøldið eftir, fríggjakvøldið 11. februar.

Óli sigur, at hetta var tað fyrsta, sum hendi í hesum rokaliga máli.

- Saman við teldupostinum frá FA var eitt skriv, har íslendingar heita á føroysk verkafólk um at fara í samhuga við teimum. Í teldupostinum stóð eisini, at skrivið er sent eftir áheitan frá Ingeborg. Har stóð einki um, at nevndin í FA stóð aftanfyri áheitanina. Vit lósu teldupostin sum ein fyrispurning – og als ikki sum eina áheitan, ei heldur sum eitt krav. Í stuttum stóð í skrivinum: "Hvat siga tit? Eiga vit ikki at stuðla teimum við, at bátar ikki sleppa at landa í Fo..."

Óli sigur, at hetta var alt, sum stóð í teldupostinum hjá FA.

- Svarið hjá eini samdari nevnd í Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag, sum FA fekk fríggjakvøldið, var, at nevndin ikki var samd, og at teir ikki ætlaðu sær í samhuga við íslendingar. Orsøkin er, at íslendingar ikki hava stuðlað okkum, tá okkara limir vóru í verkfalli, leggur hann aftrat.

## Undarligar lýsingar

Hann sigur, at tað næsta, sum hendir í hesum máli, er, at FA longu sunnudagin lýsir við samhuga – og at Føroya Arbeiðarafelag noktar limum sínum at landa íslendsk lodnuskip.

- Í fyrstu lýsingini hjá FA snúði tað seg um landing av lodnu, men seinni tók meginfelagið eisini sild og makrel uppí, tá ið ráddi um Fuglafjørð, soleiðis at bannað varð at landa allan íslendskan pelagiskan fisk í Fuglafirði, meðan bara lodna varð bannað í Kollafirði – eftir lýsingini hjá FA.

Óli Johannesen sigur seg ivast í, um Føroya Arbeiðarafelag yvirhøvur hevur lisið teldupostin hjá felagnum í Fuglafirði, áðrenn felagið lýsti samhuga, tá hesin varð sendur fríggjakvøldið.

- Vit fingu ongantíð svar upp á okkara teldupost, og eingin setti seg í samband við okkum aftur. Tað einasta, vit hoyra, er tað, sum ført verður fram í fjølmiðlunum, leggur hann aftrat.

## Longu mánadag

Formaðurin í Fuglafjarða Arbeiðsmannafelag heldur tað vera eitt mistak av FA, at meginfelagið ikki setti seg í samband við felagið í Fuglafirði aftur, men bara lýsti við samhuga – eisini vegna feløgini í Fuglafirði.

- Eg haldi, at hetta var ein vánalig handfaring av einum slíkum álvarsmál, sigur Óli.



Hann heldur, at tað næsta stóra mistakið, sum Føroya Arbeiðarafelag gjørdi, var at lýsa við samhuga longu frá mánamorgni, tá íslendingar annars ikki ætlaðu sær í verkfall fyrr enn í fyrsta lagi týskvøldið eftir.

- Á henda hátt vildi FA tvinga føroysk verkafólk í samhugaverkfall longu, áðrenn verkfallið í Íslandi yvirhøvur byrjaði. Hvør var orsøkin til, at føroyingar skuldu í verkfall longu áðrenn íslendingar, spyr formaðurin í Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag.

## Var ikki í ÚF

Tað, sum kanska serliga irriterar Óla Johannesen er sambært honum sjálvum, at Ingeborg Vinther hongur hann út fyri at hava sagt ymiskt í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya.

- Útvarpsmaðurin, Sigmar Bláberg, ringdi til mín, tá hetta málið tók seg upp. Eg segði, at eg ætlaði mær ikki at gera samrøðu um málið, tí vit mettu hetta sum eitt innanhýsismál. Sigmar spurdi, hvat vit í Fuglafirði fóru at gera, um íslendsk skip komu á Fuglafjørð. Eg segði, at tað vóru ikki vit, sum høvdu lýst samhuga, men FA, og tí noyddist hann at venda sær hagar. Vit høvdu sum nevnt heldur einki hoyrt frá FA, sum svar upp á tað, ið vit vórðu spurdu um og høvdu svarað uppá.

Óli sigur, at hann roknaði við eini sterkari reaktión frá Ingeborg Vinther, og hon kom eisini.

- Hon rópti meg lygnara, hóast øll onnur vistu, at tað var satt, sum eg hevði sagt. Hetta haldi eg ikki sømir seg einum fakfelagsleiðara og leiðara í einum meginfelag.

## Eingin samhugi

Óli Johannesen sigur, at íslendingar hava ongantíð stuðlað verkafólki í Føroyum við samhuga av týdningi, tó at føroysk arbeiðarafeløg áður hava heitt á íslendingar um stuðul.

Hann sigur, at í ár 2000 vóru føroysk verkafólk í samhuga við íslendsk verkafólk, og í 2001 vóru íslendingar í 24 tímar samhugaverkfalli við føroysk verkafólk.

- So var tað yvirstaðið, og síðan tá hevur eingin stuðul verið at heinta í Íslandi, leggur hann aftrat.

Óli vísir á, at í 2003 bóðu føroyingar aftur um samhuga í Íslandi, men fyrst bóðu íslendingar um nummar á skipum og nøvn fyri síðan at venda aftur og siga, at tíðarfreistin var ov stutt.

- Úrslitið var, at føroysk skip tá landaðu eini 30.000-40.000 tons har yviri, og føroyska arbeiðarafjøldin var vónsvikin. Teir rættu okkum onga hond, men hildu okkum bara hen, leggur formaðurin í Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag aftrat.

## Diktatorisk leiðsla

Honum líkar slett ikki framferðina hjá forkvinnuni í meginfelagnum.

- Vit svaraðu bara einum fyrispurningi, sum varð sendur í telduposti av skrivstovuni hjá FA. Vit vórðu spurdir – og vit svaraðu, men hoyrdu ongantíð nakað aftur uttan hóttanir. Vit halda okkum tí ikki at hava gjørt nakað skeivt, og vit sýttu ongantíð fyri at fara í verkfall.

Óli Johannesen sigur, at hetta mál bendir á, at Føroya Arbeiðarafelag hevur eina diktatoriska leiðslu, sum hann málber seg.

- Antin ert tú við – ella ert tú reinur fíggindi, har besta vápnið tykist vera álop. Vit hava tosað við onnur arbeiðarafeløg, men nógv bendir á, at tað bara eru feløgini í Fuglafirði, sum fingu henda fyrispurning frá Føroya Arbeiðarafelag, sigur formaðurin í Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag, sum er sera vónsvikin av hesi framferð.

# Álvarsamt ikki at akta meginfelagið

**- Hetta er stór ov vanærilig skomm fyri arbeiðarafeløgini í Fuglafirði, segði Ingeborg Vinther, forkvinna í FA, tá rokið stóð upp á**

Vilmund Jacobsen

Tá íslendingar lýstu verkfall, gjørdu Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag av at nokta limum sínum at landa íslendsk skip í Føroyum fyri at vísa samhuga við íslendsku fakfeløgunum.

Men hóast limafeløgini í Føroya Arbeiðarafelag hava skyldu at fylgja boðunum, kundi Kringvarpið fortelja, at arbeiðarafeløgini í Fuglafirði noktaðu at akta boðini.

Íslendska verkfallið varð kortini avlýst, og úr Íslandi frættist, at manglandi stuðul úr Føroyum er ein orsøk til, at verkfalli varð avlýst. Um samhugi ikki var í Føroyum, kundu skipini bara sigla á Fuglafjørð at landa.

- Hetta er ein ræðulig gerð hjá arbeiðarafeløgunum í Fuglafirði og ein stór og vanærulig skomm fyri tey, staðfesti Ingeborg Vinther, tá Portalurin tosaði við hana.

Hon segði, at hetta kann koma føroysku arbeiðararørsluni aftur um brekkur so tað munar, tí tá ið vit ikki stuðla arbeiðarafeløgum í øðrum londum, kunnu vit heldur ikki vænta, at tey fara at stuðla okkum, skuldu vit lýst eitt verkfall, og eg ivist onga løtu í, at hetta verður dýrt fyri okkum seinni, segði hon við Portalin.

Hon legði aftrat, at hetta, sum fuglfirðingar hava gjørt, er heilt ófyrigeviligt.

Ingeborg segði, at mótstøðan í Fuglafirði rættir arbeiðsgevarunum eina hond.

- Tað er álvarsamt, tá limafeløg ikki akta boðini frá Føroya Arbeiðarafelag, og eftir lógini kunnu feløgini í Fuglafirði fáa eina átalu, tey kunnu fáa bót, ella í ringasta føri, kunnu tey verða tveitt úr Føroya Arbeiðarafelag.

Hon legði aftrat, at Føroya Arbeiðarafelag ikki hevur tosað um revsitiltøk ímóti fuglfirðingum.

*vilmund@sosialurin.fo*